# LÆRLINGUR

Søkt verður eftir HVS Lærlingi til

**pf Maria Poulsen**

Vit vænta at tú ert raskur/røsk og
Fyrikomandi. Koyrikort er Eitt krav.

Ert tú tann rætti persónurin, ert tú vælkomin at
senda eina umsókn. Til ap@mp.fo
Umsóknin skal vera okkum í hendi innan 14.02.2011

**P/F Maria Poulsen**
**Smyrilsvegur 8**
**Postboks 182**
**FO 110 Tórshavn**



Meiri fæst at vita við at ringja til Arthur Poulsen
á tlf. 312 000 Ella send ein mail á ap@mp.fo

**pf Maria Poulsen**

Box 182 · FO-110 Tórshavn

P/F Maria Poulsen er størsta HVS virkið í Føroyum við handli,verkstaði og
búnýti. Í dag starvast um 35 fólk í fyritøkuni. Alt innan heilsølu og smásølu.



**Leygardagin 29. januar kl. 17 (e)**

Í sendingini er samrøða við Terkel Spangsbo
og Suzanne Zabava frá danska fakblaðnum
Motormagasinet, sum fyrireika ein túr til
Føroya fyri fólk frá donsku bilbransjuni.

Eisini verður hybridbilurin Toyota Auris
HSD royndarkoyrdur saman við Høgna
Háberg Hansen, sølumanni hjá Reyni
Service. Jákup á Borg frá Bilrøkt fortelur
um nýggja bilportalin Bilrokt.fo.
Eisini er ein samrøða við Baldvin Harðarson
frá felagnum Hitamyndir.

*** Sendingin verður eisini endursend sunnudagin 30. januar kl. 17.**



Suzanne Zabava



Jákup á Borg



Høgni Háberg Hansen

**Vinnu- & bilradio á Rás 2**


# Stjóri til Landsverk

## » *Søkt verður eftir stjóra til Landsverk at byrja 1. mars ella skjótast til ber*

**Starvið**: Stjórin hevur evstu ábyrgd av stovninum og vísir beinleiðis til aðalstjóran í Innlendismálaráðnum. Saman við leiðsluni á stovninum leggur tú virksemið til rættis og setir yvirskipaði mál fyri øll arbeiðsøki. Harafturat hevur tú evstu ábyrgd av, at øll verklagsarbeiði hjá landinum verða væl frágingin, av fíggjarstýring, og at játtanir verða hildnar. Sum stjóri kemur tú at samstarva tætt við politisku skipanina. Tú kemur tí at hava ein týðandi leiklut í at mynda hetta samstarvið. Harafturat verður títt samstarv við vinnuna tætt, og er tað ein fortreyt, at hetta samstarvið er optimalt. Landsverk er ein týðandi stovnur í føroyska samfelagnum og gerast bygnaðarbroytingar ella aðrar broytingar neyðugar, skalt tú ganga á odda.

**Fakligar førleikakrøv**: Tú setir fakliga støðið í hásæti og hevur høgan fakligan integritet. Tú hevur akademiska útbúgving eitt nú innan verkfrøði, búskaparfrøði ella løgfrøði. Royndir innan leiðslu er ein treyt. Harafturat er kunnleiki til fíggjarstýring ein treyt, meðan kunnleiki til byggi- og ráðgevingarvinnuna er ein fyrimunur. Harafturat er tað fyrimunur, um tú hevur leiðsluútbúgving.

**Persónlig førleikakrøv:** Tú hevur førleikar til at mynda stovnin úteftir, hevur framúr góð samskiftisevni og dugir væl at orða teg mótvegis starvsfólki, politisku skipanini, fjølmiðlum og almenninginum annars. Tíni samstarvs- og leiðsluevni eru av teimum bestu. Tú dugir væl við fólki og evnar at draga viðkomandi starvsfólk inn í avgerðir, men torir samstundis at skera ígjøgnum, tá tað er neyðugt. Somuleiðis skalt tú vera før/ur fyri at taka skjótar og sjálvstøðugar avgerðir. Tú varðveitir yvirlitið og sært yvirskipað upp á uppgávurnar, ið stovnurin varðar av. Tá støðan krevur tað, dugir tú eisini at fara niður í viðkomandi smálutir. Tær dámar væl at arbeiða undir trýsti, ert framsøkin og skjót/ur at seta teg inn í nýggj viðurskifti. Harafturat ert tú ágrýtin eftir at fáa sum mest burturúr virkseminum á stovninum og hevur ein jaligan hugburð mótvegis broytingum.

**Setanarviðurskifti:** Starvið er flokkað ájavnt við 38. lønarflokk hjá Tænastumannafelag Landsins, og verður ein viðbót veitt, sum svarar til munin millum 38. og 39. lønarflokk hjá Tænastumannafelag Landsins. Tó er ikki talan um eitt tænastumannastarv. Eftirlønargjaldið er 15% av eftirlønargevandi lønini. Setanartreytir annars verða ásettar í sersáttmála.

**Umsóknir:** Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verður at senda til runij@imr.fo og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 7. februar 2011 kl. 16. Merk umsóknina „Stjóri". Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Rúna Joensen, aðalstjóra í Innlendismálaráðnum, á tlf. 558070 ella runij@imr.fo

*Við umleið 130 starvsfólkum er Landsverk ein av størstu landsstovnunum í Føroyum. Landsverk er undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar. Somuleiðis situr stovnurin fyri tilbúgvingarmálum á landi og sjógvi.*



www.imr.fo

INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

SENDISTOVAN